# Eru føroyingar fremsta forðing fyri framburði í Føroyum?

TINGHELLAN
*Hóraldur Joensen*
*lektari á Fróðskaparsetri Føroya*



*- Tað er ikki løgið, at útlendingar kalla føroyingar fyri óseriøs og forkelað grenj, sigur Hóraldur Joensen, lektari á Náttúruvísindaligu deildini og leiðari fyri granskingarkjarnanum í evnafrøði og livtøkni*

Hóast greitt samband er ávíst millum universitetsgransking og landsbúskaparliga framgongd, nýta Føroyar sára lítið av peningi til gransking og enn minni til matvørugransking. Føroyar eru í ávísan mun framvegis rávøruframleiðari, eins og onnur menningarlond. Føroyar gagnnýta ikki allar tøkar fíggingarmøguleikar. Føroysk gransking er offur fyri neurotiskum og skizofrenum tjóðskapar- og ríkisfelagspolitikki. Føroyar vilja heldur ríka einstaklingar enn at tæna fjøldini. Føroyingar umtalaðir uttanlands sum óseriøs forkelað grenj. Føroyingar velja heilt tilvitað at svíkja seg sjálvar

Øll lond kring okkum hava langt síðani ásannað týdningin av at hava vælskipað og virkin universitet. Framkomnar búskaparfrøðiligar greiningar hava týðiliga víst eitt greitt positivt samband ímillum tjóðskaparliga universitetsgransking og fíggjarliga framgongd. Universitetsgransking økir um kappingarførið við miðvísari og áhaldandi kunnleikaframleiðslu, kunnleikaflutningi frá einum virkisøki til annað, eins og nýskapan í ídnaðinum og búskapinum. Høvuðsíkastið frá granskingini er øking av framleiðsluorkuni hjá arbeiðsmegini. Universitetini geva studentunum lærdóm, vitan og granskingarførleika. Eftir lokið universitetsprógv gerast kandidatarnir høvuðskeldan til nýhugsan og nýskapan í feløgunum, teir arbeiða hjá.

Universitetsgransking mennir eisini nýggjar náttúruvísindaligar greinar, nýggja tøkni og fremur process-batar. Hugaúrdráttir, sum virki kunnu ogna sær við sáttmálum, ráðgeving og við at gagnnýta úrslit úr vísindaligum greinum. Við hesari mentalu barlast kunnu virki og smiðjur av ymsum slagi so økja um fæfeingisframleiðsluna (kapital produktivitetin) og skapa nýggj produktir, processir og tænastur, sum aftur geva nýggj arbeiðspláss, útflutning og ávinning.

Umframt mátiliga gagnið á búskapin, vísa kanningar, at universitetsgransking fremur sosialar og fíggjarligar batar hjá øllum landsins tegnum. Framin sæst aftur á heilsuøkinum, sosiala økinum, skúlaskipanini, rættarskipanini og hópin av øðrum økjum. Stutt sagt, universitetsgransking hækkar lívsdygdina hjá fólki.

## Fróðskaparsetur Føroya

Í Føroyum vóru vit sera sein at leggja lunnar undir universitet landsins, Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis). Stovnsetingin fór ikki fram fyrr enn í 1965. Og nakað seinni, í 1972, var Náttúruvísindadeildin (The Faculty og Science and Technology) sett á stovn. Til sammetingar, varð Universitetið í Keypmannahavn stovnað longu í 1479.

## Mestsum øskukalt

Hóast vit byrjaðu væl seinni enn grannar okkara, kundu vit havt spent okkum munandi meiri út enn gjørt er hesi seinastu árini, høvdu valdshavandi politikkararnir her á landi játtað meiri pening til gransking og menning. Veruleikin er, at verandi skipan við ymsum undirvísingar- og granskingareindum virkar ikki optimalt vegna manglandi fígging. Harmiligt og landsskaðiligt, at so nógv undirvísingarvirksemi (t.d. KT) og granskingarvirksemi liggur í andaleypi vegna tvørrandi játtanir.

## Ótroytt evnafrøðilig granskingarøki

Dømi um møgulig granskingarøki, sum beinleiðis hava tilknýti við høvuðsvinnuna her á landi, eru lipidir í fiskagøgnum, flaki og skræðu, fiskaenzymir, fiskaprotein, proteinhydrolysat, mikro- og nano-hylkt bioaktiv fiskapeptid, fiskacollagen, fiskagelatin (skræðu- og beingelatin), lívvirkisfrøðilig evni í fiskarognum og fiskasili, hávaúrdráttir, rækjuúrdráttir (chitin, chitosan), krabbaúrdráttir, heilsugagnligir taraúrdráttir, funkuføði (functional food), nutraceuticals, heiliráðskostur (medical food) og føðslurelateraðar medicinskar verkætlanir. Hóast høvuðsframleiðslan her á landi er matframleiðsla, er mestsum øskukalt á hesum granskingarøkjum, vegna tvørrandi fígging. Vit føroyingar, og bert vit føroyingar, hava ábyrgdina av hesi skilaleysu og vánaligu støðu.

## Evnafrøðilig gransking offrað

Evnafrøðilig og lívtøknilig gransking eins og onnur gransking, er national og international og eigur ikki at líða undir líkasælum, seintvirkandi og óvirknum stjórnarráði. Hon eigur at vera ótengd av neurotiskum og skizofrenum tjóðskapar- og ríkisfelagspolitikki. Granskingin her á landi eigur ikki at verða offur fyri dølskni og manglandi áræði at seta pening av á fíggjarlógini til rannsóknir, ella líða av tvískinnis-atferðini: samstundis biðja og frábiðja sær fígging. Fyri granskingina ger tað ongan mun, um fíggingin kemur úr Keypmannahavn ella Bruxelles. Granskingin eigur ikki at vera offrað í hundraðára gamla tvídráttinum um fullveldisstat ella ríkisfelagsskap. Sum er, nýta vit nógva tíð og orku úrslitaleyst, til at fáa fatur á granskingarpengum úr ES, men senda hvørt ár 350 milliónir krónur aftur í danska statskassan. Var henda upphædd nýtt til gransking, menning og undirvísing, hevði hon, um rætt varð atborið, ikki ført til Hollendska sjúku ella yvirupphitaðan búskap. Vit høvdu fyri langari tíð síðani havt eitt fult útbúgvið og útgjørt universitet og undirvísingarverk. Harafturat kundi samferðslukervið verið fult útbygt, og búskapurin sjálvberandi. Við rættari framferð høvdu vit harafturat havt so mikið stórt fíggjarligt avlop, at Føroyar kundu veitt fíggjarligan stuðul til ringast staddu kommunurnar í Danmark og Grønlandi eins og øðrum norðurlondum. Men kallarnir á ovastu valdsrók velja heilt tilvitað ikki at gagnnýta allar fíggjarmøguleikar, sum okkum føroyingum standa í boði. Harvið svíkja teir sína skyldu at tæna landi og fólki í best møguligan mun. Fáar aðrar tjóðir á klótuni hava slíkar fyrimunaligar umstøður at virka undir. Tað er ikki løgið, at útlendingar, ið kenna til føroysk viðurskifti, kalla okkum óseriøs forkelað grenj.

## Milliardir av krónum til undirskotsvirksemi

Í staðin fyri at veita hóskandi fígging til fólksins upplýsingar- og granskingarstovn, Fróðskaparsetur Føroya, hava stjórnandi kallarnir her á landi valt at ovurstuðla lítið lønandi yrkjum og beinleiðis undirskotsvirksemum við nøggjusiffraðum upphæddum. Tilsamans ovurhonds stórar upphæddir til nøkur fáa virki og persónar her á landi. Til teir sum halda landinum uppi, varð sagt. Vanlukkuligu fíggjarligu fylgirnar av landskassaveðhildnu lánum í áttati- og níti-árunum merkjast framvegis millum manna. Til dømis rindaði ráfiskagrunnurin frá 1975 til 1995 umleið 200 milliónir krónur í meðal um árið til veiða av ótýðandi og lítið týðandi fiskasløgum. Samlaða útgoldna upphæddin hetta 20-ára tíðarskeiðið var umleið 4 milliardir almennar krónur. Ein týðandi partur av hesum almenna stuðuli kom frá sokallaða blokkinum, ið upprunaliga varð ætlaður til millum annað heilsuverkið, undirvísing og gransking. Men til gransking skuldi blokkurin ikki nýtast, tí syrgdu okkara fólkavaldu oddafiskar fyri.

Harafturat vórðu fleiri milliardir almennar krónur óbeinleiðis veittar til ein svartkjaftatrolara fyri og annan eftir, hóast tann fyrsti ongantíð bar seg fíggjarliga, til partar av kemikaliu-tangaskipaflotanum, ið allur fór á heysin, og til skilaleysar ovurílløgur í flakavirki kring landið. Fleiri óvarandi fólk komu tíanverri í største fíggjarliga óføri av ílløgumynstrinum, ið íleggjararnir nýttu. Eitt ílløgumynstur, sum var heimilað av landsins leiðslu.

## Grov stuðulsmisnýtla

Henda stuðulsskipanin varð til tíðir grovliga misnýtt. Eitt hitt fúlasta dømið um markleysa gagnnýtlsu av hesi høpisleysu skipan, var stóra kongafiskaveiðan hjá djúpvatnstrolara, sum eftir at vera landað og fíggjarstuðlað við lítlari milliónkrónum úr landskassanum, vísti seg at verða so vánalig, at hon ikki var mannaføði og mátti burturbeinast. Hon varð vippað út av einum eiði saman við øðrum burturkasti. Annað grovt dømi var stóra upsaveiðan hjá rokskipara, sum umframt at hava fylt last og dekk, kom søkklaðin til lands, sleipandi trolið hálvfult av ókruvdum deyðum, rotnandi fiski. Øll tann spilta og hálvspilta veiðan varð landað og gylt av peningi rann enn einaferð úr landskassanum. Slíkir fiskikongar eru framvegis mettir sum rættir menn, ið byggja land. Stórt sæð allur trolveiddi upsin verður framvegis virðisminkaður av ov

*Varð ríkisveitingin ikki skerd, men peningurin ístaðin brúktur til gransking og menning, høvdu vit havt kunnað ment samfelagið so nógv, at vit fyri langari tíð síðani høvdu havt ein sjálvberandi búskap*

*Varð ríkisveitingin ikki skerd, men peningurin ístaðin brúktur til gransking og menning, høvdu vit havt kunnað ment samfelagið so nógv, at vit fyri langari tíð síðani høvdu havt ein sjálvberandi búskap*

*Sum er, nýta vit nógva tíð og orku úrslitaleyst, til at fáa fatur á granskingarpengum úr ES, men senda hvørt ár 350 milliónir krónur aftur í danska statskassan*